

*Norðurlendskir skúlastjórar eru í hesum døgum á vitjan í Klaksvík.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

# Skúlastjórar á vitjan

**Skúlaovastar úr vinabýum hjá Klaksvík vitjað í hesum døgum í Føroyum**

SKÚLI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Leygardagin komu fleiri útlendskir skúlastjórar til Klaksvíkar á vitjan.

Hetta er ein partur av vinabýarsamstarvinum hjá Klaksvíkar kommunu við Tampere í Finlandi, Norrkøping í Svøríki, Trondhjem í Noregi, Odense í Danmark og Kópavági í Íslandi.

Hetta vinabýarsamstarv umfatar fleiri øki, men skúlaøkið hevur verið eitt av mest virknu seinnu árini.

**Eisini í Havn**

Norðurlendsku skúlastjórarnir búgva á Hotel Norð á Viðareiði, men teir brúka fittan part av tíðini í Klaksvík.

Sunnumorgunin vóru fólkini í kirkju á Viðareiði, og í gjár varð leiðin løgd til Havnar, har fundur millum annað skuldi verða í skúlaleiðarafelagnum.

Í dag er ferðalagið aftur í Klaksvík, og møguliga verður útferð gjørd við Alpha Pilot.

Í morgin fara skúlastjórarnir at vitja á skúlunum í Klaksvík – bæði teimum kommunalu skúlunum og Tekniska skúla.

Ein partur av vitjanini snýr seg eisini um Agenda 21 umhvørvisætlanina, og hvussu hendan ætlan kann gerast sjónligari í skúlanum.

# Friðarligt í høvuðsstaðnum

Løgreglan í Havn hevði lítið og einki at taka sær av um vikuskiftið.

– Talan var um eitt stak friðarligt vikuskiftið, sigur vakthavandi á Politistøðini í Havn.

Tað, sum løgreglan hevði á skránni, vóru nøkur fá smáting. Okkurt brotið bilspegl og líknandi.

Annars var fitt av fólk í býnum um vikuskiftið, men hesaferð spældi alt friðarliga av.

**ek**

# Umfatandi herverk í Sandvík

**Fleiri bilar fingu stóran skaða av herverki tíðliga sunnumorgunin**

HERVERK
*Eyðun Klakstein*

**Sandvík:** Tað var óhugaligt hjá fólki í Sandvík at koma á føtur sunnumorgunin. Fleiri bilar í bygdini høvdu verið útsettir fyri herverki, og onkur hevði fingið stóra skaða.

Onkur hevur skøvað bilarnar illa, og harðast rakti bilurin hevur fingið skaða fyri eini nakrar 10.000 krónur.

Løgreglan í Suðuroy fekk beinanvegin fráboðan um tilburðin, men yvirvøldin stendur á berum.

Fólk í Sandvík halda seg vita, at einki var hent bilunum um hálvgum trýtíðina sunnunáttina. Tí má herverkið verða framt millum hálvgum trý og klokkan hálvgum nýggju um morgunin, tá fólk gjørdust varug við skaðarnar.

Løgreglan í Suðuroy vil gjarna í samband við fólk, sum kunnu hjálpa løgregluni við upplýsingum í hesum málinum.





Ert tú tann rætti ... ?

Hevur tú hug at vera í einum mennandi, avbjóðandi og kravmiklum umhvørvi, sum setur krøv til bæði tínar fakligu og persónligu eginleikar ?

Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú eina fjølbroytta og áhugaverda útbúgving innan peningastovns- og viðskiftatænastu. Tú fært kunnleika til at veita bæði privatum og virkjum fíggjarligar tænastur og ráðgeving í einum hátøkniligum umhvørvi.

Hetta gevur tær eisini førleika at starvast innan aðrar vinnur ella sum liður í víðari útbúgving. Tó fara vit sjálvandi at stremba eftir, at tú framhaldandi ert ein av okkara, tí arbeiðið er mennandi og avbjóðandi. Hevur tú áræði, hava vit fleiri tilboð um víðari útbúgving innan fíggjarøkið.

**Næmingatíðin**
Í næmingatíðini luttekur tú í próvgevandi lærugreinum, samstundis sum tú gongur í peningastovnsskúla. Næmingatíðin er 2 ár.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HF- ella tilsvarandi prógv. Eisini næmingar, ið taka prógv í summar eru vælkomnir at søkja.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara.

**Umsóknin**
Send umsóknina við avriti av próvskjølum til niðanfyristandandi adressu, so hon er okkum í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2001 kl. 16.

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin Yviri við Strond 2 100 Tórshavn Tel 348 000 Fax 348 453
E-mail: steinbjorn.hardlei@sparikassin.fo www.sparikassin.fo





